# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-131_1.3
dags. 31-01-2011

**Fíggjamálaráðið**

fmr fmr.fo

***Viðv.: Tygara mál nr. 6345-0047/2011\ 3 um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri***

Felagið mótmælir upp á tað harðasta hesum uppskotinum, har fíggjarliga frælsi hjá kommununum, sjálvur grundarsteinurin undir kommunala sjálvstýrinum, verður ógvusliga skert.

Eittans endamál er við uppskotinum, nevniliga, at skerja grundlógartryggjaða kommunala sjálvræði.

Felagið heitir tí á Fíggjarmálaráðið, um at taka uppskotið aftur.

**Skuldarmarkið og skuldarbundnu kommunurnar**

Galdandi skipanin við lofti á nettoskuld hjá kommunum er ein rættvís og nøktandi skipan. Møguleiki er hjá skuldarbundnum kommunum at liggja inni gjaldføri, sum verður nýtt til at halda kommununa koyrandi, innan ógvuliga strammar fíggjarligar karmar.

At noyða skuldarbundnar kommunur at minka um gjaldføri, sum skal nýtast til reka kommunana og tryggja borgaranum neyðugu tænasturnar, kann á ongan hátt góðtakast.

Um ein slík skipan við brottuskuld verður gjøgnumførd, fara tær kommunur, sum longu eru skuldartyngdar, bert at blíva meira og meira afturúrsigldar í mun til hinar. Tá fáa vit veruliga A, B og kanska C-kommunur í Føroyum.

**Gjaldføri og grundarlagið undir kommunala rakstrinum**

Kommunur hava altíð tørv á, at hava eitt ávíst gjaldføri. Tað er óansæð hvussu stórt lán kommunan hevur. Vandi er fyri, at kommunur, sum liggja á markinum til mest loyvdu skuld, ongantíð koma at hava eitt nøktandi gjaldføri. Hetta kemur at ganga útyvir raksturin av kommununi og tær tænastur borgarin hevur krav á.

Tær kommunur sum liggja á skuldarmarkinum, ella beint omanfyri, verða, við uppskotinum, heilt skerdar við íløgum. Hendir hettar, verða hesar kommunur enn longri afturúrsigldar.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

# FØROYA KOMMUNUFELAG

Kommunur eru í dag í tí støðu. Einastu íløgurnar tær kunna gera, eru við ”avlopinum” av rakstrinum. Við nýggju lógini, so skal hetta avlop nýtast til at gjalda lán niður við.

Felagið metir, at yvirheldur ein kommuna sínar avtalur við fíggingarstovn, so eigur FMR ikki at áleggja kommununi, at gjalda skjótari niður uppá lán, enn tað sum kommunan og fíggingarstovnurin eru samd um.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður                Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo